## Málveitsla fekk Everton víðari

Everton spældu seg flúgvandi víðari til áttandapartsfinalurnar í UEFA Cup, eftir at teir vunnu 6-1 móti norska felagnum Brann úr Bergen. Aiyegbeni Yakubu úr Nigeria bleiv stóra hetjan, tá hann við einum hattrikki, hjálpti munandi um møguleikarnar hjá teimum bláu úr Liverpool. Álopsmakkari hansara, Andrew Johnson fekk eisini tvey mál, so tað má sigast at hava gingist teimum avbera væl. Everton knústu Brann út úr kappingini, og eru víðari eftir ein samlaðan sigur, áljóðandi 8-1.



## Kaos á FSF-skrivstovuni

Í kvøld er evstamark fyri spælaraskifti hesumegin summarsteðgin. Og sum vera man er nógv at gera á FSF-skrivstovuni, tá feløg royna at fáa spæliloyvini upp á pláss í evstu løtu. Kaos'ið var tó størri enn vant á skrivstovuni hósdagin, tmen hetta komst av tekniskum ávum. – Ein reim slitnaði í kopi-maskinuni hjá okkum, og tá hon samstundis eisini er fax, fingu feløgini ikki sent okkum neyðugu pappírini. Og tað skapti sum vera man nakað av kaos, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari. Nýggj kopimaskina og nýtt fax varð tó útvegað, so føroysku fótbóltsfeløgini hava møguleika at senda neyðugu skjølini inn í dag eisini.

VB-Neistin 22-29 (11-16):

# Onki avgjørt enn



*Daiva Tuomaite roynir seg her móti Neistamálinum, og hennara partur lá heldur ikki eftir fyrrakvøldið. Neistin eru við sigrinum, enn sera væl við í stríðnum um FM-finalusessin, og onki er avgjørt enn*

**Hvat orsøkin var til tapið móti Neistanum, er ilt at siga, men givið er, at VB fegin hevði vilja havt Lailu Jespersen á liðnum í gjárkvøldið, tá tær taptu 29-22. Laila var ikki við orsakað av leikbanninum, hon fekk 10 sekundir áðrenn tíð í dystinum móti Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

VB og Neistin kempa um at fáa eina finalusessin um FM, móti Stjørnuni, og Neistin tóku eitt risafet nærri hesum veruleika í gjárkvøldið, tá tær vunnu í Vági móti júst VB.

Góð byrjan hjá gestunum

Neistin byrjaði sera væl, og sambært Ásu á Neystabø, fingu tær verjuna at virka til fulnar.

- Vit løgdu okkum á odda heili 6-2, og í veruleikanum komu VB ongantíð nærri. Vit snøgt sagt runnu frá teimum, sigur Ása á Neystabø, og leggur afturat, at av tí, at verjan stóð so stinn, fingu tær runnið kontra nærum ótarnaðar.

### Tættist í oddinum

Við sigrinum løgdu Neistakvinnurnar seg uppá 16 stig, bert tvey aftanfyri VB, sum í løtuni liggur til at hava finalusessin móti Stjørnuni.

VB man tó enn roknast til at vera favorittur, til at vinna sær sæti í ársins FM-finalu, um man hyggur eftir, hvørjar dystir, liðini hava eftir.

Bæði liðini hava fimm dystir eftir.

## FAKTA

10 min. : 4-7
20 min. : 9-13
40 min. : 14-23
50 min. : 18-26

**Málskjúttar**:
**VB**: Daiva Tuomaite 10 (5), Christina Holm 4, Bára K. Mortensen 3, Monika Samuelsen 2, Theresa Joensen 1, Miriam Michelsen 1.
**Neistin**: Nicoleta R. Hansen 7, Unn J. Kragesteen 7, Ása á Neystabø 5, Anja Heinadóttir 3, Rakul Magnussen 2, Rakul Augustinussen 2 (2), Elin Holm 1, Helena á Krákusteini 1, Elin Staksund 1.
**Brotskøst**: VB 6, Neistin 2
**Útvísingar**: VB 0, Neistin 3
**Dómarar**: Hanus Kúrberg & Birgir Sondum

## Vetrarkapping leygardagin

**Leygardagin skipar Treysti fyri 4. umfari av VetrarKappingini 2007/2008 í Hvannasundi. Kappingin byrjar klokkan 11 og byrja allir bólkar samstundis**

RENNING
*Tiðindaskriv*

Allir bólkarnir renna 10 km uttan børnini, sum renna 4 km. Runnið verður á einum rundteini á umleið 1 km. Startur og mál verður við Gamla Skúla í Hvannasundi. Runnið verður frá skúlanum og norður í Sandoyrabug, so suður gjøgnum fjøruna eftir nýggju gøtuni, sum Hvannasunds Kommuna hevur gjørt, og so niðan á bygdavegin úti í Bug, har snarað verður til vinstru og runnið norðureftir til gamla skúla. Møguleiki verður at skifta í Gamla Skúla.

Í sambandi við renningina verða heiðursmerki latin til nummar eitt, tvey og trý í øllum bólkunum.

Tilmelding fer fram á heimasíðuni hjá Frælsur Ítróttur Føroya www.athletics.fo ella www.renn.fo innan fríggjakvøldið 22. februar á miðnátt.

Luttakararnir verða bidnir um at møta við Gamla Skúla í Hvannasundi hálvan tíma áðrenn start. Luttøkugjaldið er sum tað plagar, tvs. kr. 50 fyri vaksin og kr. 20 fyri børn.

Hetta er fyrstu ferð kapprenning er í Hvannasundi og vónar Treysti at nógvir rennarar verða við, tí øll eru vælkomin at luttaka.